# Smirlar og Sm

## Tá tann fimmti Smyrilin stevnir inn á Trongisvágsfjørð í dag, eru júst liðin 110 ár siðani, at tann fyrsti Smiril fór úr barkastokki í Malmø

Men munur er á skipum. Tann nýggi Smyril kostar 268 milliónir krónur at smíða, tá dagbøtur eru drignar frá. Tann fyrsti kostaði 70.000 krónur og var um 162 brutto registar tons. Tann nýggi er heili 12.320. Dampmaskinan á fyrsta Smirli var 160 hk, men tann nýggi hevur ein høvuðsmotor, sum er fýra ferðir 3.360 kw.

Í dag er ræður fyrst og fremst um at koma skjótt um Suður-oyarfjørð. Fyri 110 árum síðani var fyrst og fremst talan um at fáa flutning. Fyrsti Smiril sigldi á nærum hvørja bygd í landinum, so tað gingu bæði dagar og vikur frá tí at hann fór av Trongisvági til hann kom aftur. Men tá hevði hann bæði verið á Havnini fleiri ferðir á veg til og úr bygdum í Eysturoynni, Norðoyggjum, Vágum og í Sandoynni. Eisini sigldi hann til útoyggjar, og fýra ferðir um árið sigldi hann til Leith í Skotlandi.

Onkuntíð verður funnist at politikkarum, tí teir leggja seg upp í ferðaætlanir. Men ríkisstýrið kravdi - fyri at A.S. J. Mortensens Eftt., sum lat Smiril smíða, kundi fáa stuðul til siglingina - at Løgtingið góðkendi fyrstu ferðaætlanina og farmagjøld. Ferðaætlanin er dagfest 18. november 1895.

Nógv varð skrivað og sagt um henda nýggja Smyril, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður við sponsku skipasmiðjuna at smíða nýggja suðuroyarskipið fyri 300 mió.kr. Nógv varð sagt og skrivað, tá tað kom fram, at hann var nógv seinkaður - eitt ár, tá avtornaði. Men nakað varð eisini sagt og nakað skrivað, áðrenn reglulig innanoyggja sigling kom í lag fyri 110 árum síðani.

### 42 fólk vildu hava rutuskip

Málið um at fáa eina sigling innanoyggja tók seg upp, tá umsókn kom á ting við 42 undirskriftum. Løgtingið tók málið upp, men einki kom burtur úr, fyrr enn sløk 10 ár seinri.

Tá velur tingið eina nevnd at tingast við DFDS um sigling innanoyggja, men DFDS hevur ongan áhuga. Tað hevur afturímóti handilsmaðurin í Miðvági, Godtfred Heinesen, sum tingaðist við skotar um fáa eitt skip til hesa sigling. Men áðrenn hann fær tingað seg til eina loysn, doyr hann knappliga.

Men Jens Andreasen í Dali, skipari, hevði eisini áhuga fyri hesum máli, og hevði í umbúna at seta eina dampmaskinu í sluppina Dauntless. Eftir frágreiðingini hjá nevndini eru skip farin at brúka "...petroleums dampmaskiner efter sigende endog til dampskibe af flere hundrede tons..." og "da petroleum som brændsels- og opvarminsmateriale er betydelig billigere end kul" hevur Jens í Dali í kvittanum at "sætte en sådan maskine i sin kutter..."

Tilboðið hjá Jens í Dali er 38.000 kr. um árið, men nevndin roknar seg til, at inntøkurnar verða einar 10.000 kr. minni, sum máttu fáast sum ríkisstuðul.

### Reiðaravirkið letur skip smíða

Men áðrenn málið er loyst, kemur handilsvirkið á Tvøroyri, A/S Johan Mortensen Eftt., upp í leikin "sum smiril í staraflokk". Í desember 1896 bjóðar Mortensens-handil seg til at reka innanoyggja sigling við damskipi frá nýggjárinum 1896. Várið eftir eru stjórarnir, Petur og Niels Juel Mortensen í Danmark og tingast við ríkisstýrið um ætlanina, uttan at tingið tykist vita nakað um tað. Í juli kemur bræv til Amtið um, at løgmálaráðið hevur gjørt avtalu við reiðaravirkið á Tvøroyri um eina innanoyggjasigling.

Um hetta mundið stóð skipið longu í gerð á Kockum Mekaniska Verkstad Aktiebolag í Malmø. Tá tað fór úr barkastokki 15. oktober 1895, fekk tað navnið Smiril og kom á Trongisvágsfjørð 19. desember. Smiril fór fór at sigla í januar 1894 og fyri siglingina lat ríkiskassin 12.000 kr. árliga í stuðli.

Fáir føroyingar høvdu útbúgving og royndir at sigla við dampskipi, og maningin var fyri tað mesta donsk. Skipari fyrstu 10 árini var ein dani, Clausen nevndur. Í 1898 sigla tó tríggir havnarmenn, Dánjal í Horni, Christian Jóhannes Dam og Niclas í Køk, við Smirli. Eftir Clausen førdu føroyingar Smiril - Hans Debes, Einar Bertelsen og Hans Olavus Poulsen, róptur Lávus á Høvda, sum eisini varð skipari við tí nýggja Smirili fyrstu tvey árini - til í 1934.

Umframt at sigla í rutusigling, varð hann eisini leigaður til vaktarskip, og í 1898 tók Smiril ein trolara fyri at fiska innan fyri



*Fyrsti Smiril*



*Næsti Smiril*



*Triði Smyril*